# Kvinnur vilja vera løgreglumenn

**Nú seinastu upptøkuroyndirnar í Føroyum til Politiskúlan í Keypmannahavn eru av, er greitt, at tríggjar kvinnur og ein maður eru sloppin inn. – Hetta er fyrstu ferð nakrantíð, at kvinnurnar hava havt greiðan meiriluta, sigur Uni Vestureið, politiinspektørur**

ÚTBÚGVING
*Vilmund Jacobsen*

Tað má sigast at vera »in« hjá kvinnum í hesum tíðum at læra til løgreglumann.

Seinastu upptøkuroyndirnar í Føroyum til Politiskúlan í Keypmannahavn eru nú av, og greitt er, at av fýra upptiknum nævningum, eru tríggjar kvinnur og ein maður.

Uni Vestureið, politiinspektørur, sigur, at hetta er fyrstu ferð nakrantíð, at kvinnur hava havt greiðan meiriluta av teimum, sum fara til Danmarkar at útbúgva seg til løgreglumann.

– Gongst hesum næmingum sum ætlað, verða teir við á føroyska politistaliðnum um eini trý ár, tá ið útbúgvingin í Danmark er lokin.

Tveir av næmingunum byrjaðu 1. apríl og tveir byrja 1. august í ár.

### 15 undir útbúgving

Uni sigur, at samlaða talið av føroyskum næmingum, sum útbúgva seg til løgreglumenn, nú er komið uppá 15, og tá eru næmingarnir íroknaðir, sum skulu byrja í august.

– Men áðrenn hesi gerast virkin í Føroyum, eru aðrir løgreglumenn farnir frá vegna aldur. So, talan er tó ikki um somu øking á føroyska politistaliðnum, sigur hann.

Tey, sum hava áhuga fyri starvinum sum løgreglumenn, kunnu altíð søkja, tí til ber nevniliga at søkja um upptøku alt árið.

– Næstu upptøkuroyndirnar verða stutt eftir summarfrítíðina, og tá skal aftur finnast fram til fýra føroyingar, sum vilja taka avbjóðingina uppá seg, sigur Uni Vestureið.

Politiinspektørurin sigur, at fleiri ungar kvinnur og ungir menn ynskja at gerast løgreglumenn, enn pláss er fyri.

– So, tað er ikki trupult at fáa næmingar á Politiskúlan, leggur hann aftrat.



*Av fýra næmingum, sum byrja á Politiskúlanum í Keypmannahavn í ár, eru tríggjar kvinnur. – Og tað er ongantíð hent áður, sigur Uni Vestureið, politiinspektørur*


RÆTTING

## FERÐAÆTLAN - SUMMARIÐ 2002

Tyrlutænastan

| SUNNUDAG | Fráferð |
|---|---|
| Vágar | 12.00 |
| Gásadal | 12.06 |
| Mykines | 12.12 |
| Vágar | 12.23 |
| Vágar | 13.00 |
| Koltur | 13.07 |
| Tórshavn | 13.12 |
| Skúvoy | 13.27 |
| Dímun | 13.32 |
| Skúvoy | 13.37 |
| Tórshavn | 13.52 |
| Klaksvík | 14.04 |
| Klaksvík | 14.35 |
| Svínoy | 14.47 |
| Kirkja | 14.51 |
| Hattarvík | 14.54 |
| Klaksvík | 15.12 |
| Tórshavn | 15.24 |
| Koltur | 15.29 |
| Vágar | 15.36 |

| MIKUDAG | Fráferð |
|---|---|
| Vágar | 09.45 |
| Gásadal | 09.51 |
| Mykines | 09.57 |
| Vágar | 10.08 |
| Vágar | 11.10 |
| Koltur | 11.17 |
| Tórshavn | 11.22 |
| Skúvoy | 11.37 |
| Dímun | 11.42 |
| Froðba | 11.51 |
| Froðba | 12.35 |
| Dímun | 12.44 |
| Skúvoy | 12.49 |
| Tórshavn | 13.04 |
| Klaksvík | 13.16 |
| Svínoy | 13.28 |
| Kirkja | 13.32 |
| Hattarvík | 13.35 |
| Klaksvík | 13.53 |
| Klaksvík | 14.40 |
| Tórshavn | 14.52 |
| Koltur | 14.57 |
| Vágar | 15.04 |

| FRÍGGJADAG | Fráferð |
|---|---|
| Vágar | 09.45 |
| Gásadal | 09.51 |
| Mykines | 09.57 |
| Vágar | 10.08 |
| Vágar | 11.10 |
| Koltur | 11.17 |
| Tórshavn | 11.22 |
| Klaksvík | 11.34 |
| Svínoy | 11.46 |
| Kirkja | 11.50 |
| Hattarvík | 11.53 |
| Klaksvík | 12.11 |
| Klaksvík | 13.00 |
| Tórshavn | 13.12 |
| Skúvoy | 13.27 |
| Dímun | 13.32 |
| Froðba | 13.41 |
| Froðba | 14.15 |
| Dímun | 14.24 |
| Skúvoy | 14.29 |
| Tórshavn | 14.44 |
| Koltur | 14.49 |
| Vágar | 14.56 |
| Vágar | 15.30 |
| Gásadal | 15.36 |
| Mykines | 15.42 |
| Vágar | 15.53 |



| Prísir | Mykines | Gásadal | Vágar | Koltur | Tórshavn | Skúvoy | Dímun | Froðba | Klaksvík | Svínoy | Hattarvík | Kirkja |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Mykines | | 85,- | 145,- | 290,- | 215,- | 335,- | 335,- | 360,- | 360,- | 360,- | 360,- | 360,- |
| Gásadal | 85,- | | 145,- | 290,- | 215,- | 335,- | 335,- | 360,- | 360,- | 360,- | 360,- | 360,- |
| Vágar | 145,- | 145,- | | 130,- | 215,- | 335,- | 335,- | 360,- | 360,- | 360,- | 360,- | 360,- |
| Koltur | 290,- | 290,- | 130,- | | 85,- | 215,- | 215,- | 290,- | 290,- | 290,- | 290,- | 290,- |
| Tórshavn | 215,- | 215,- | 215,- | 85,- | | 130,- | 130,- | 215,- | 215,- | 215,- | 215,- | 215,- |
| Skúvoy | 335,- | 335,- | 335,- | 215,- | 130,- | | 85,- | 85,- | 335,- | 335,- | 335,- | 335,- |
| Dímun | 335,- | 335,- | 335,- | 215,- | 130,- | 85,- | | 85,- | 335,- | 335,- | 335,- | 335,- |
| Froðba | 360,- | 360,- | 360,- | 290,- | 215,- | 85,- | 85,- | | 360,- | 360,- | 360,- | 360,- |
| Klaksvík | 360,- | 360,- | 360,- | 290,- | 215,- | 335,- | 335,- | 360,- | | 110,- | 110,- | 110,- |
| Svínoy | 360,- | 360,- | 360,- | 290,- | 215,- | 335,- | 335,- | 360,- | 110,- | | 110,- | 110,- |
| Hattarvík | 360,- | 360,- | 360,- | 290,- | 215,- | 335,- | 335,- | 360,- | 110,- | 110,- | | 85,- |
| Kirkja | 360,- | 360,- | 360,- | 290,- | 215,- | 335,- | 335,- | 360,- | 110,- | 110,- | 85,- | |

Galdandi frá 1. mai til 1. oktober

**BÍLEGGING**
Tel 34 10 10
Fax 34 10 01
**Mán. - Frí.**
Kl 08.00 - 16.00
**Sun.**
Kl. 12.00 - 16.00

**BØRN**
0 - 6 ár: Ókeypis
7 - 13 ár: 50%

**VIÐFØRI**
Í mest lagi 20 kg.

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 40 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo






Sjónvarp Føroya fer nú undir eina stóra og undirhaldandi spurnakapping í almennari vitan. 80 luttakarar fáa høvi til at kappast fram til eina finalu, har vinnarin kann fara heim við 50.000 kr.

Er tín almenna vitan nøkunlunda í lagi og, ert tú eitt kappingarmenniskja, so er hetta títt høvi at royna teg.
Við hepni og taktikki kann tað gerast tú, ið at enda strýkur av stað við endavinninginum.

**Spurningur**: Hvør av hesum fýra oyggjum er tann størsta?

**1. Borðoy 2. Sandoy 3. Eysturoy 4. Vágoy**

Skriva, maila ella faxa okkum rætta svarið saman við upplýsingum um navn,aldur, adressu og telefon nummar.

80 sleppa ígjøgnum nálareygað. Hví ikki tú?

team85

svf

Sjónvarp Føroya, Box 21, FO-110 Tórshavn, fax: 318815, t-post: svf@svf.fo




# Drúgt rættarmál um teldusník

**Mikudagin viðgjørdi Føroya Rættur eitt mál um ein 18 ára gamlan drong, sum ákærdur fyri at gera eina roynd at bróta inn í eina teldu hjá løgregluni. Rættarmálið vardi í fimm tímar**

TELDULÓGARBROT
*Stefan í Skorini*

Drongurin vil ikki játta seg sekan í at hava hakkað seg inn á telduna hjá løgregluni, men hann viðgongur, at hann hevur verið á internetinum í tí tíðarskeiðnum, sum lógarbrotið skal hava verið framt. Dómur verður sagdur í málinum komandi mikudag.

Málið hevur verið sera drúgt, tí lógarbrotini, sum drongurin er ákærdur fyri, vórðu framd í oktober mánað í 1999, tá hann var 15 ára gamal.

Talan var um, at ákæruvaldið fór at leggja ákærurnar móti dronginum til viks, men tá hann ikki vildi játta seg sekan, endaði málið í rættinum.

Drongurin skal hava gjørt tvær royndir sama dag at bróta inn í telduna, sum tó ikki var á innanhýsis netinum hjá løgregluni. Tí kundi drongurin ikki fáa hendur á týðandi ella loyniligum málum.

Drongurin hevur ikki hakkað gjøgnum heimasíðuna hjá løgregluni í Føroyum, tí hon var als ikki á internetinum tá. Løgreglan hevði hinvegin internetsamband, sum mest varð nýtt til at senda teldupost.

Drongurin hevur ikki fingið hendur á nøkrum upplýsingum gjøgnum telduna, tí hon hevði eina trygdarskipan, sum forðaði hesum. Um tað hevði eydnast, so hevði hann kunnað lisið teldupost millum løgregluna og borgarar, og hann hevði eisini kunnað fingið fatur á loyniorðum.

Í desember varð ein maður dømdur fyri stuldur, tá hann hakkaði seg inn á eina teldur og tók loyniorðið til internetsambandið hjá viðkomandi. Soleiðis kundi hann fara á internetið uttan at gjalda.

Maðurin fekk ein tvey ára treytaðan dóm, sum merkir, at um hann ger slíkt lógarbrot næstu tvey árini, so skal hann inn at sita. Harumframt skuldi maðurin rinda 1.200 krónur í bót.

# Marknaðardagur í Sjónleikarhúsinum

M-DAGUR
*Stefan í Skorini*

Leygardagin 4. mai klokkan 11 letur marknaður upp í Sjónleikarhúsinum. Hesin dagurin verður nevdur M-dagurin. Tá verða dyrnar latnar upp til landsins størsta marknaðardag.

Tað er Havnar Sjónleikarfelag, sum skipar fyri tiltakinum fyri at savna pening inn til felagið.

Sjónleikarfelagið sigur, at tey hava fingið eins nógvar lutir inn í ár sum undanfarin ár. Tey siga eisini, at tey ongantíð hava fingið so fáar lutir, sum ikki kunnu brúkast. Tey leggja seg altíð eftir at hava eina ávísa góðsku á marknaðardegnum.

Nógvir áhugaverdir lutir vera at fáa til keyps hesuferð. Nevnast kunnu sjónvørp, stereoanlegg, kikararar og lutir, sum savnarar møguliga hava áhuga í. Harumframt er innbúgv, klæðir, leikur, køksamboð, teppi, gardinir og mangt annað eisini at fáa.

# 6 mánaðir handan rimar

RÚSEVNI
*Stefan í Skorini*

Ein 37 ára gamal føroyskur maður varð mikudagin dømdur seks mánaða treytaleysa fongsulsrevsing fyri keyp av rúsevnum. Maðurin játtaði seg sekan, men hann fer at hugsa seg um, áðrenn hann tekur við dóminum.

Maðurin varð dømdur fyri at hava keypt 860 gramm av hassji, 28 gramm av amfetamini og 20 gramm av kokaini. Hesin handil er farin fram yvir fleiri ár, og alt hevur verið til egið brúk.

Maðurin játtaði, at hann hevur keypt størsta partin av rúsevnunum frá einum manni, sum framvegis situr í varðhaldinum hjá løgregluni í stóra rúsevnismálinum.

### Treytaður dómur

Ein 21 ára gamal maður varð eisini dømdur í Føroya Rætti mikudagin fyri brot á lógina um euforiserandi evni.

Maðurin fekk 74 dagar treytaða fongsulsrevsing. 60 dagar vóru fyri keyp av rúsevnum, og 14 dagar vóru fyri brot á ferðslulógina.

Hann er dømdur fyri at hava keypt 60 gramm av amfetamini, og hann seldi 20 gramm víðari við einum vinningi á 1.000 krónur. Eisini hevur hann keypt 15 ecstacy pillarar til sín sjálvs og vinir.

Lógarbrotini eru framd í Danmark, men av tí at talan er um eitt ájáttanarmál, kundi rættarfundurin vera í Føroyum.

# Rúna Hilduberg stjóri í Granskingarráðnum

**Granskingarráðið hevur fingið nýggjan stjóra. Talan er um Rúnu Hilduberg, sum nú tekur við starvinum**

GRANSKINGARRÁÐ
*Stefan í Skorini*

Høvuðsuppgávan hjá Granskingarráði Føroya er at ráðgeva løgtingi og landsstýri í granskingarmálum og at virka sum millumlið millum føroyskt vinnulív og føroyskar myndugleikar.

Ráðið hevur tvey umboð frá Føroya Arbeiðsgevarafelag og eitt umboð frá Fiskimálastýrinum, Vinnumálastýrinum, Heilsumálastýrinum og Mentamálastýrinum, sum eisini velur formannin.

Uppgávurnar hjá ráðnum eru at játta og umsita peningaligan stuðul til føroyska gransking, at leggja ætlanir fyri granskingartiltøk, at taka stig til og stuðla týdningarmiklum granskingartiltøkum og at standa fyri og umsita granskingarætlanir hjá aðalstýrum og øðum.

Rúna Hilduberg fær ábyrgdina av nýggju umsitingini. Hon er útbúgvin í Danmark, Føroyum og USA sum verkfrøðingur, og hon hevur masterútbúgving (MMT) í ídnaðarleiðslu, fyriskipan og menning.

Hon hevur áður arbeitt í privatari vinnu innan ídnað, handverk og byggivinnu í Føroyum og uttanlands. Eisini hevur hon arbeitt hjá tí almenna sum deildarstjóri fyri vinnu- og miðnámsskúladeildina í Mentamálastýrinum og sum lærari á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði.

# Eivør hevur listaframsýning

FRAMSÝNING
*Stefan í Skorini*

Leygardagin 4. mai letur ein nýggj listaframsýning upp í Riberhúsi í Fuglafirði. Framsýningin letur upp klokkan 16, og tað er Eivør Pálsdóttir, ið eigur málningarnar.



Umframt at hyggja eftir málningunum verður eisini livandi tónleikur at hoyra. Áskoðararnir fáa eisini kaffi og køkur afturvið. Eivør er serliga kend innan tónleikin í Føroyum, men nú roynir hon seg eisini sum listamálara.